# á bóli



# Umstøðurnar til venjing mugu betrast munandi

**Skal føroyskur fimleikur taka seg enn meira fram – og helst fram um Isle of Man – er alneyðugt við betri umstøðunum at venja undir. Tað ber ikki til at leita eftir tímum og brúka nógva tíð til at gera klárt og rigga av, tá ið venjast skal, halda royndasti fimleikarin á føroyska landsliðnum og landsliðsvenjarin**

FIMLEIKUR
*Eyðun*
*eydun@sosialurin.fo*

**Scalloway:** – Eg veit ikki, hvussu hugaligir fótbóltsspælararnir høvdu verið, um teir skuldu sett málini upp, hvørja ferð teir skuldu vant.

Soleiðis sigur Høgni R. Øster, tá ið hann tosar um umstøðurnar, sum fimleikur hevur at venja undir í Føroyum.

– Vit hava brúk fyri einari høll, sum útilokandi er til fimleik. Har skal útgerðin standa klár, so at tað altíð kann venjast, og tað slepst undan at brúka nógv tíð til at gera klárt og rudda av, sigur royndi føroyski fimleikarin, sum mánadagin varð við til at tryggja føroyingum gull í liðkapping í fimleiki.

– Avgerandi orsøkin til, at Isle of Man er frammanfyri okkum, er, at tey hava nógv betur umstøður til at venja undir. Høvdu vit havt slíkar umstøður, so kundu vit vant meira og fyrireika okkum enn betur til Oyggjaleikirnar, sigur Høgni R. Øster.

### Fasilitetir skapa munin

Landsliðsvenjarin í fimleiki, danin Henrik Berthelsen, tekur undir við Høgna R. Øster.

– Í 2001 var føroyska liðið minst líka gott sum tað av isle of Man, men síðani hava teir verið frammanfyri okkum, og tað kemst útilokandi av, at tey hava betur umstøður til at venja í, sigur Henrik Berthelsen.

Hann heldur, at myndugleikarnir ikki hava skilt, havt skal til fyri at menna fimleikarar.

– Nógvir politikarar hava tað fatan av fimleikinum, at tað eru nakrar gentur, sum renna runt á gólvinum í einari høll, men soleiðis er tað bara ikki.Tað skal meira til enn nakrir tímar í einari høll, har alt skal gerast klárt og takast niður hvørjaferð.

– Tað eru tvey fimleikasentur á Isle of Man, og har er útgerðin til fimleik altíð tøk at brúka. Tað eru slíkar umstøður, sum vit hava brúk fyri í Føroyum, sigur Henrik Berthelsen.

*Helgi Winther Olsen vann silvurmerki sum næstbesti fimleikarin í liðkappingini mánadagin*



## Heri um reppið at fáa bronsu

**Heri Ziska endaði sum nummar 4 í hamarkasti mánadagin. Hann var ikki langt frá bronsumedaljuni, men gullvinnarin var í einum flokki fyri seg og setti nýtt Oyggjaleikamet**

HAMARKAST
*Eyðun*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** Mánadagin var kappingin í hamarkasti á leikvøllinum á Clickimin ítróttardeplinum.

Heri Ziska var við í hesari kappingini, og tað var líka við, at hann vann bronsumerki.

Heri Ziska tveitti 43,01 metrar, og tað var slakar 80 sentimetrar styttri enn bronsuvinnarin av Gotlandi. Cayman Island fór við silvurinum, og Isle of Wight við gullinum.

Andy Frost av Isle of Wight er í flokki fyri seg, og hann setti nýtt Oyggjaleikamet við 68,17 metrum. Hann tveitti næstan 20 metrar (!) longur enn tann næstbesti.

Andy Frost er ættaður av Isle of Wight, men hann er so góður í hamarkasti, at hann hevur verið á enska U21 landsliðnum.

## Marius er millum teir bestu

**Tingwall:** Mánadagin vóru tveir føroyskir byrsuskjúttar við liðkappingini í skeet, sum var hildin á skjótibreytini í Tingwall.

Marius Joensen og Rúni Debes stóðu seg væl, tí teir endaðu sum nummar 4 í kappingini. Føroyar fingu 144 dúgvur, meðan teir frá Isle of Man fingu 160 dúgvur og vunnu bronsuna.

Tað var tó hugaligt at síggja yvirlitið yvir teir einstøku skjúttarnar í liðkappingini, tí Marius Joensen gjørdi rættiliga vart við seg í hesari kappingini.

Samanlagt var hann næstbesti skjúttin, og hann var beint í hølunum á tí besta skjúttanum.

John Magnus Laurenson úr Hetlandi rakti 86 av 100 dúgvum, meðan Marius hevði 84 plettskot.

Hetta skuldi givið ávísar vónir til einstaklingakappingina í skeet, sum verður seinni í vikuni